Dagf. 15. oktober 2021
HMR J. nr. 21/20375-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-050/2021 eftir § 52a í tingskipanini um langar bíðitíðir til barnapsykiatriina, frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu langar eru bíðitíðirnar til barna- og ungdómsspykiatriina?
2. Hvussu nógv børn og ung standa á bíðilista?
3. Hvussu eru bíðitíðirnar býttar á ymisku aldurs- og sjúkubólkarnar?
4. Er nøktandi starvsfólkaorka til tey børn, sum longu eru í viðgerð?

Svar:

Til spurning 1
Sambært Sjúkrahúsverkinum er metta bíðitíðin til útgreining í Barna- og ungdómspsykiatriini í løtuni um 16-17 mánaðir. Metingin byggir á, at tað í løtuni eru 194 børn á bíðilista, og at Barna- og ungdómspsykiatriin við verandi starvfólkaorku klárar tríggjar nýggjar útgreiningar um vikuna. Tá er feria hjá starvsfólkum íroknað. Er talan um akutta ella sonevnda «subakutta» støðu, verða sjúklingarnir sjálvandi raðfestir framum í bíðilistanum.

Til spurning 2
Tað standa sum nevnt 194 børn og ung á bíðilista til útgreiningar. 117 børn í aldrinum 0-11 ár og 77 ung eru í aldurbólkinum 12-17 ár. Til samanberingar vóru 166 børn og ung á bíðilista í apríl, so talan er um ein vaksandi bíðilista. Høvuðsorsøkin til at bíðitíðin er so long og eisini er vaksin seinastu árini er, at munandi fleiri børn og ung eru ávíst til útgreiningar og viðgerð. Í løtuni megnar Barna- og ungdómspsykiatriin ikki at arbeiða undan við verandi starvsfólkaorku. Heilt einfalt verða fleiri nýggj børn ávíst til Barna- og ungdómspsykiatriina, enn tey klára at útgreina.

Til spurning 3
Innanhýsis er skipað eitt barnatoymi, ið tekur sær av børnum í aldrinum 0-11 ár, og eitt toymi fyri ung í aldrinum 12-17 ár. Ávís tíðarskeið kann bíðitíðin vera eitt vet longri hjá øðrum aldursbólkinum, men tað skiftir. Júst nú, er bíðilistin til barnatoymið longri, men bíðitíðin er umleið tann sama fyri báðar aldursbólkar.

Barna- og ungdómspsykiatriin ger ikki mun millum møguligu sálarligu avbjóðingarnar, sum ávíst verður fyri. Ein partur av útgreiningararbeiðinum er at finna útav, hvør avbjóðingin er. Ofta vísir tað seg, at avbjóðingin er ein onnur og meira samansett, enn hon, sum er lýst í ávísingini. Barna- og ungdómspsykiatriin bjóðar tó viðhvørt sonevndar "subakuttar tíðir" til at finna útav, um barnið hevur tørv á akuttari viðgerð, vegna akuttan vanda fyri sjálvmorð, tunglyndi, psykosu og etingarólag.

Til spurning 4
Yvirskipað kann sigast um starvsfólkaorkuna, at tað er trupult at fáa barnapsykiatarar í starv. Tí hevur eitt av verandi trimum føstu serlæknastøvunum verið ósett síðani juli 2021 og hevur tað ávirkan á virksemið á deildini. Tó ber til at lyfta ta samlaðu starvsfólka- og útgreiningarorkuna við at upprøfesta aðrar fakbólkar, eitt nú sálarfrøðingar og sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava ein týðandi leiklut í bæði útgreiningar- og viðgerðaruppgávunum.

Landsstýrismaðurin er í løtuni í samskifti við sjúkrahúsleiðsluna um, hvussu fíggjarliga upprøfestingin av Psykiatirska Deplinum seinastu tvey árini er brúkt, umframt hvussu ætlaða upprøfestingin til økið komandi ár verður brúkt skilabest við atliti at starvsfólkaorku, soleiðis at bíðitíðin til útgreining kann minka – samstundis sum eitt nøktandi viðgerðatilboð kann verða veitt teimum sum longu eru í viðgerð í Barna- og ungdómspsykiatriini.

Heilsumálaráðið, 15. oktober 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður